## Lívligur royalur hundur

Hundurin hjá drotningini varð í so lívligur, tá ið Margretha drotning og Heindrikkur prinsur mikudagin fór umborð á kongaskipið Dannebrog.

Celimené, sum hundur kallast, hevði størri hug á einum ljósum labradori, sum stóð á bryggjuni, enn at fara umborð, og endin var, at drotningin noyddist at lata hovsekriterinum taka sær av hundinum

## Kvinna við 3,47 promillu

Ein norsk kvinna hevur í vikuni staðið skúlarætt fyri rúsdrekkakoyring seinasta heyst. Kvinnan varð tikin av løgregluni, og tá ið kannað varð, hvussu nógv hon hevði drukkið, vísti promillan heili 3,47. Í rættinum greiddi kvinnan í hesi vikuni frá, at hon hevði drukkið nógv allan dagin, og seinnapartin fekk hon hug at fara ein biltúr. Hon kláraði tó ikki at halda bilinum á vegnum, og rendi seg fasta í vegjaðaranum. Har helt hon fram við at drekka, til løgreglan kom fram á hana. Rætturin tók koyrikortið frá kvinnuni í fýra ár, hon fekk 35.000 krónur í bót, og hon skal inn at sita í 45 dagar.

## Legendur á okkara leiðum

Livandi legendurnar Simon & Garfunkel kom í summar til Norðurlond at spæla, og teir skulu eitt nú spæla í Parkini í Keypmannhavn tann 23. juli. Paul Simon og Art Garfunkel vóru í 1960'unum menninir aftan fyri klassiskar sangir sum »Bridge over trouble water«, »Mrs Robinson«, »The boxer« og nógvar aðrar. Síðani teir í 1970 góvust at spæla saman hava teir bert hendingaferðina staðið á palli saman, men nú eru teir aftur farnir á konsertferð.

## Peningur í glaðari starvsfólkum

Nógvar milljónir krónur kunnu sparast, um arbeiðsumhvørvið á almennum arbeiðsplássum varð bøtt. Tað vísir ein nýggj kanning, sum Forbundet af Offentlig Ansatte í Danmark hevur gjørt.

FOA hevur kannað 1100 av sínum limum, fyri at finna orsøkina til fráveru vegna sjúku. Niðurstøðan er, at bæði tað fyskiska og tað sykiska arbeiðsumhvørvið hevur stóra ávirkan á fráverutíttleikan.

Víst verður á, at bert við at lækka sjúkudagatalið úr 15 niður í 12, eru milljónir hjá landinum at spara.

FAO finst at tí almenna, fyri ikki at gera langtíðarhugsanir.

- Tað er ein vanlukka, at tað verður nýttur so nógvur peningur uppá sjúkufráveru, sum ístaðin kundu verið nýttur til at bøta um arbeiðsumhvørvið, sigur Inger Bolwinkel, skrivari í Forbundet af Offentlig Ansatte í Danmark.

**rs**

*Kelda: Jyllands Posten*


## Hølir í Tórshavn til leigu

Hølir sum eru vælegnað til skrivstovu, ráðgevingarvirksemi og annað.

Hølini er uml. 100 $m^2$ og er møguleiki fyri at víðka til 200 $m^2$. Hølini hava egna inngongd og møguleika til allar hentleikar sum t.d. toilet, køk. vm.

Eisini er høli 200 $m^2$/1400 CBM, ið er vælegnað til goymslu, ídnað og annað virksemi. Høli hevur 2 portur sum eru 4,0 x 4,5 metur til støddar hvørt. Toilet og aðrir hentleikar eru í hølinum.

Sera gott útsýni og tætt við høvuðsveg.

**Sosialurin**
**Box 76 · FO-110 Tórshavn**
**Bill.mrk. 609**


# Bretski sendiharrin á vitjan

**VITJAN**
*Jan Müller*

Í dag, Dýri biðidag, koma bretsku sendiharrahjúnini í Danmark, Sir Nicholas Browne og Lady Browne á vitjan í Føroyum. Hetta er teirra fyrsta vitjan her, síðani sendiharrin tók við starvinum 8. september í fjør. Sendiharrahjúnini fara at brúka leygardagin og sunnudagin at síggja Føroyar. Mánadagin verður høvi at hitta fólk, eitt nú eisini løgmann. Seinnapartin mánadagin verður so høvi hjá sendiharrahjúnunum at hitta bretar bretskar vinir, og í hesum sambandi verður skipað fyri móttøku í Listaskálanum millum klokkan 16 og 18.



*Bretski sendiharrin í Danmark, Sir Nicholas Browne, sum kemur á sína fyrstu Føroyavitjan í dag*

Hvør er so hesin góði maður! Hann er føddur í 1947 og var útbúgvin við Cheltenham College og University College Oxford. Hann fór at arbeiða í bretska uttanríkisráðnum í 1969. Aftaná at hava verið á Norðuramerika kóntórinum í eitt ár las hann persiskt, áðrenn hann kom at arbeiða á sendistovuni í Teheran í 1971. Frá 1980 arbeiddi hann á politisku deildini á sendistovuni í Zimbabwe til hann so fór aftur til London árið eftir at arbeiða við sjómálum, flogferðslu og umhvørvi í uttanríkisráðnum.

Seinni kom hann at arbeiða í Bruxelles sum fyrsti skrivari á bretsku umboðsstovuni í ES. Har var hann í fimm ár, áðrenn hann vendi aftur til Iran í 89. Eitt skifti var hann so eisini á sendistovuni í Washington og leiðari fyri bretsku informatiónstænastuni í New York. Eftir at hava verið í USA í fýra ár vendi hann aftur til uttanríkisráðið í London sum leiðari av miðeysturskrivstovuni. Seinni vendi hann so aftur til Iran, har hann eitt skifti var sendiharri. Í 1999 varð Nick Browne tillutaður heiðursmedaljuna Commander of St. Michael&St. George. Í 2002 gjørdist hann riddari við heitinum Knight of the British Empire. Hann tók so við sum sendiharri í Danmark í fjør. Sir Nicholas er giftur við Diana, Lady Brown. Tey eiga tveir synir og tvær døtrar.

# Børnini heiðraðu Gurið



**Gurið Mortensen var ein av stóru leikarunum á kvinnulandsliðnum í hondbólti, sum júst hevur vunnið silvur í Itlalia. Hon starvast við dagrøktarbørnum og tá hon mikudagin kom til arbeiðis gjørdist hon glað og bilsin**

**HONDBÓLTUR**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Gurið Mortensen starvast í sínum gerandisdegi við dagrøktarbørnum. Hon starvast í sonevndu Doktarahúsunum í Vági, har dagrøktarbørnini eisini halda til.

Gurið Mortensen var ein av hondbóltskvinnunum, sum vann silvur í Itlaia í sera spennandi kappingini har. Tá Gurið mikudagin kom aftur til arbeiðis eftir ferðina í Italia, gjørdist hon glað og bilsin. Dagrøktarbørnini vóru nevniliga til reiðar at taka ímóti hondbóltshetjuni. Við føroyskum fløggum tóku tey ímóti Gurið og í gongini hekk eitt skreytuppslag við mynd av børnunum, har tey ynsktu henni tilukku við silvurheiðursmerkinum. Jú, hetjan var komin aftur til arbeiðis og fekk uppibornan heiður.




# ítróttur

Nr. 87 • fríggjadagur • 7. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tað gongur hvønn sín vegin

**Sannførandi GÍ eigur heimavøll ímóti NSÍ, sum higartil hevur havt ilt við at fáa nakað burturúr**

**GÍ–NSÍ**
*Jóannes Hansen*

Tað eru grannalið við ógvuliga ymiskari úrtøku higartil í ár, sum leygardagin fara at bresta saman í telving um pláss í hálvfinaluni. GÍ eigur heimavøll, tí teir í bólkaumfarinum endaðu á fremsta plássinum. Har var eingin slingur í valsinum. GÍ fekk fult stigatal.

Tað var ikki fyrrenn í síðsta bólkaumfarinum, at tað varð greitt, at NSÍ skuldi verða partur av fjórðingsfinaluni. Og í tveimum teimum fyrstu umførunum í landskappingini hevur tað heldur ikki gingið meiri enn passaligt. NSÍ hevur fingið eitt stig, meðan GÍ hevur fult stigatal ella fimm fleiri enn NSÍ.

Manningarliga tóktust báðir partar í gjár at skula vera so væl fyri leygardagin, sum tað ber til. Tá skal kortini havast í huga, at hjá teimum eins og øllum hinum luttakarunum í fjórðingsfinaluni vóru venjingar á skánni í gjárkvøldið og aftur í dag.

Hanus Jacobsen hjá Gí noyddist at taka seg aftur, tá ið bara fimm minuttir vóru farnir síðsta sunnudag á Svangaskarði, men hann hevur vant aftur. GÍ liðformaðurin, Poul Ennigarð, noyddist at lata seg skifta út, tá ið tjúgu minuttir vóru eftir ímóti B68. Hann hevði fingið ein snudd í annað beinið. Fyrrapartin av hesi vikuni vandi hann fyri seg sjálvan, men í Gøtu ivaðust teir í gjár ikki í, at hann fer at spæla ímóti NSÍ.



*Krsystof Popczynski og hansara menn í GÍ skulu royna at halda fram við góða úrslitinum, tá teir dystast við við NSÍ í fjórðingsfinaluni*

Einasta ferðin, GÍ og NSÍ hava spælt ímóti hvørjum øðrum í ár, var í venjingardysti í Runavík, áðrenn tað varð farið undir bólkaumfarið. Ta ferðina vann GÍ 2–0.

Seinnu árini hava hesi bæði feløgini ofta spælt tættar steypadystir. Í 2001 endaði fjórðingsfinalan í Runavík málleys eftir longda leiktíð, og NSÍ vann brotssparkskappingina 4–3. Í fjør telvaðust grannaliðini um finalupláss. Í fyrru hálvfinaluni, sum var í Runavík, endaði tað 1–1, og í seinnu hálvfinaluni skoraði GÍ sigursmálið til 3–2, tá ið tað restaðu níggju minuttir. Á Ólavsøku tapti GÍ finaluna ímóti B36 3–1.

Oddmar Andreasen skal døma í Gøtu leygardagin.

# Púra opið í Fuglafirði

**Ovi Nysted er aftur farin at venja við KÍ, ið leygardagin fer at vitja ÍF, sum framvegis eigur fyrsta steypasigurin til góða**

**ÍF–KÍ**
*Jóannes Hansen*

Bæði ÍF og KÍ hava higartil í ár verið roknað sum tvey av liðunum, ið eru hampuliga væl fyri. Higartil í ár hava klaksvíkingar og fuglfirðingar ikki spælt fótbólt ímóti hvørjum øðrum. Tí er fjórðingsfinlan í Fuglafirði fyrsti møguleikin at sammeta hesi bæði liðini.

Hjá ÍF vóru brøðurnir Høgni og Bárður á Lakjuni burturstaddur sunnudagin, tá ið ÍF fekk fult ímóti NSÍ. Teir eru báðir tøkir undan fjórðingsfinlauni.

Hjá KÍ hevur Ovi Nysted verið til venjingar aftur. Í gjár varð møguleikin roknaður at vera góður fyri, at Ovi verður í KÍ ferðalagnum til Fuglafirðar leygardagin. Hann verður neyvan við frá fyrsta bríksli. Men tað kann væl vera, at hann fer at verða skiftur inn í álopið, um tað í 2. hálvleiki fer at verða mett neyðugt at leggja størri trýst á ÍF. Seinastu árini hevur Ovi verið miðverji. Síðani hann fyri hálvum øðrum mánað síðani fór burturfrá, hava Niclas Niclasen og Aleksander Djordjevic verið miðverjar.

Í síðstu viku vónaðu teir í Klaksvík, at Jacob Bymar kanska fór at verða tøkur í fjórðingsfinaluni. Nú er tað greitt, at tað verður hann ikki. Tað er eisini óvist, um hann verður førur fyri at spæla ímóti EB/Streymi um eina góða viku. Jacob Bymar er ikki farin at venja saman við hinum enn.

Leygardagin vera tað seks ár síðani, at KÍ hevði vitjan avÍF í fjórðingsfinalu í steypakappingini. Úrslitið var 3–1 til KÍ. Fuglfirðingar hava higartil ikki vunnið steypakappingina. Síðsti steypasigurin hjá KÍ var i 1999, tá ið teir eisini vóru meistarar.

Birgir Sondum fer at døma í Fuglafirði seinnapartin leygardagin.

# VB miðvøllurin avmarkaður

**Sannlíkt er tað, at John Petersen fer at spæla frá fyrsta bríksli, meðan tað er greitt,at miðvallar stýrimaðurin hjá VB verður leikbannaður**

**B36–VB**
*Jóannes Hansen*

Einastu fjórðingsfinalan sunnudagin verður tann millum steypavinnararnar úr B36 og VB.

Miðvøllurin hjá VB er heilt víst skerdur, og tað kann væl vera, at tað fer at svíða uppaftur dyggari, enn teir í VB vóna, at tað skal gera.

Milan Kuljic fekk gult kort í síðsta umfarinum í bólkaspælinum. Talan var um triðja gula kortið í steypakappingini í hesum árinum. Hjá VB er tað sera dyggur smeitur, at spælskiparin ikki sleppur á vøllin í Gundadali í morgin.

Tað er eisini møguleiki fyri, at ein annar av týdningarmiklu miðvallarunum hjá VB ikki fer at verða førur fyri at spæla. Talan er um Palla Augustinussen. Á Sevmýri ímóti Skála fekk Palli ein snudd í økslina.

Hjá B36 er tað spakuliga farið at ganga tann vegin, at royndu spælararnir aftur verða førir fyri at spæla. John Petersen hevur fyri fyrstu ferð í langa tíð vant saman við liðfeløgunum í hesi vikuni. Tað er tí rættuliga sannlíkt, at hann verður millum teir fyrstu ellivu.

VB hevur eina einastu ferð vunnið steypakappingina. Tað var í 1974. Tá skipaði fótbóltsnevndin hjá ÍSF fyri tveimum steypakappingum. Onnur var kappingin um Ísafjarðarsúluna, og hin var ein felags steypakapping. VB vann báðar kappingarnar.

B36 og VB hava ikki dystast í týdningarmiklari uppgerð í hesum kappingarárinum. Frammanundan bólkaumfarinum í steypakappingini var VB norðanfyri. Tá spældu teir millum fleiri aðrar venjingardyst ímóti B36, sum vann 9–0. Báðir partar eru samdir um, at tað er stórur møguleiki fyri broytingum tveir teir seinastu mánaðirnar.



*Fyri VB er tað dyggur smeitur, at Milan Kuljic er leikbannaður ímóti B36*

Lassin Isaksen fer at døma í Gundadali sunnudagin.